# TWR KVINNUR VIÐ VÓN

## At sameina hjørtu okkara í bøn

### *Bønaráheitanir fyri desember 2024 fyri Vestur- og Miðafrika*

1. Faðir, styrk tey, ið arbeiða fyri at fría kvinnur, frá at verða útnyttaðar. Tú baðst okkum at "lata upp munnin fyri hin málleysa". (Orðtøkini 31,8.)
2. Gud, lat fólkið í Senegal hava skynsemi at kenna falskar, religiøsar leiðarar, vera vís at velja teir bólkar, tey koma saman við, og frels tey frá at líta á avgudar. (Kolossebrævið 2,8)
3. Harri, lat frið, og tryggleika valda í eystara parti av Nigeria. Varðveit fólkið har, og lat yvirgang av vápnaðum brotsmonnum fáa ein enda. (Sálmur 91,1-5)
4. Kæri Faðir, vit biðja Teg um at geva unga fólkinum í Mali tey arbeiði, tey hava søkt at fáa í økinum har. Gev teimum vón, meðan tey bíða. (Rómbrævið. 12,12)
5. Gud, gev leiðararunum í Liberia, ið júst eru valdir, áræði og vísdóm. Lat teir, ið eru kristnir meta seg eftir Tínum reglum, tá ið avgerðir viðvíkjandi heilsu, arbeiði og útbúgving skulu takast. (Sálmur 72)
6. Faðir, vit biðja Teg um at varðveita fólkið í Gabon frá sjúkum. Lat øll hava atgongd til gott heilsuverk. (Sálmur 103, 2-3)
7. Harri, virka í hjørtunum á leiðarunum har norðuri á Fílabeinsstrondini, ið kunnu hava ávirkan at steðga teimum, ið fremja kvinnuliga umskering. (Orðtøkini 31,8-9)
8. Vit biðja, at Heilagi Andin vil senda eina veking millum kvinnur í Miðafrikanska Lýðveldinum og nýta okkara TWR Kvinnur við Vón toymi at hjálpa kvinnunum at vaksa í Kristusi. (Efesusbrævið 3, 16-19)
9. Vit biðja Teg, Harri, um at styrkja tær kvinnur í Benin, sum eru offur fyri tvingsilsgiftu. Ger, at tær koma at kenna teg og finna sálarfrið. (Esaias 41,10)
10. Faðir, styrk og varðveit kristin í norður Nigeria, ið verða forfylgd fyri trúgv sína av teimum, sum hoyra til tann ráðandi átrúnaðin. (2. Timoteusarbræv 3,11)
11. Gud, kom teimum trúgvandi kristnu hjúnunum í Mali til hjálpar, ið hugsa um hjúnaskilnað. Gev hesum pørum náði og vísdóm at greiða fløkjurnar. (Matteus 19,6)
12. Takk, Faðir, fyri kraftina í Evangeliinum, ið hevur brotið valdið hjá siðvenjum, sum Tær ikki líkar, í lívunum hjá ungdóminum í Liberia, sum eru í truplum umstøðum. (Rómbrævið 1,16)
13. Gud, vit biðja, at leiðararnir í Gabon bera seg rættvíst at, hava gjøgnumskygni og arbeiða saman til frama fyri tjóðina og fólkið har. (1. Timoteusarbr. 2, 1-2)
14. Harri, bint í navni Jesusar sjálvmorðsandan á Fílabeinsstrondini. Lat tey, ið verða freistað og roynd av hesum sjálvmorðsandanum, verða fríað og finna satt lív í Tær. (Job 33,4)
15. Faðir, varðveit tær fátæku, einligu kvinnurnar í Miðafrikanska Lýðveldinum, sum hava verið neyðtiknar. Veit teimum og børnunum, tær hava fingið, hjálp. (Sálmur 82, 3)
16. Harri, vit biðja Teg um at útvega arbeiðspláss og hjálpa kvinnum í Benin, ið eru hart raktar í fíggjarligu kreppuni har. Veit teimum tímiliga hjálp. (Sálmur 81,17 – ensk: 81,16)

17. Faðir, fría fólkið í Nigeria frá átrúnaðarligu hugsanini at líta á góð verk og staðbundnar siðir. Lat tey fáa eitt lívgevandi samband við Teg. (Jóhannes 4, 24)
18. Góði Gud, hjálp teimum, ið hava mist maka ella foreldur í yvirgangsatsóknum í Mali. Lat brotsmenninar koma fyri rættin, fáa sín dóm og venda við til Tín. (Esaias 1,17)
19. Á, Harri, grøð genturnar í Liberia, ið hava verið útsettar fyri rúsevnum og kynsligari misnýtslu í familjuni. Lat foreldrini virða og elska tær og taka sær av teimum. (Efesusbrævið 6,4)
20. Gud, lat kvinnurnar á Fílabeinsstrondini, ið lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingum, liva eftir tí, ið tær hoyra, so lív teirra kann verða umbroytt. (Rómbrævið 12,2)
21. Himmalski Faðir, ger, at tey ráðandi í Miðafrikanska Lýðveldinum seta í verk lógir til at verja kvinnur, sum verða illa viðfarnar av monnum sínum. (Sálmur 10, 17-18)
22. Faðir, bjarga og grøð børn og foreldraleys í Benin, sum eru illa viðfarin og kropsliga skadd. (Sálmur 72,4)
23. Harri, eggja trúgvandi í Gabon at biðja inniliga fyri tjóðini um frið og rættvísi. Lat trúgvandi kristin har breiða út náði og miskunn Tína til teirra, sum tey liva ímillum. (Mika 6,8)
24. Gud, gev familjum tímiliga hjálp, ið uppliva torførar tíðir og ógvusligt fátækdømi orsakað av hækkandi prísum í Nigeria (Sálmur 23,1)
25. Harri, vit biðja Teg um at fáa sosiopolitisku støðuna og trygdarstøðuna í samgonguni hjá Sahel-tjóðunum, ið fevnir um Mali, Niger og Burkina Faso, í fasta legu. (Rómbrævið 12,18)
26. Faðir, styrk trúgvandi kristnar kvinnur í Liberia, sum virka millum ungdóm, ið heldur til á gøtunum. Gev teimum vísdóm til at hjálpa teimum í teirra tørvi, bæði andaliga, likamliga og sálarliga. (Jákupsbræv 2:26)
27. Gud, lat ungdómin í Gabon fáa atgongd til dygdargóða útbúgving og skilagóða vegleiðing, so tey kunnu hava vón og eina bjarta framtíð. (Orðtøkini 11,14)
28. Harri, broyt hjørtuni á teimum, sum gera fjølmiðlatilfar á Fílabeinsstrondini, ið eggjar til siðloysi. Lat tey í staðin gera sendingar við reinum, lívgevandi innihaldi. (Filippibrævið 2, 15-16)
29. Gud, hjálp teimum í Liberia at útvega pening til kvinnur, sum hava tørv á radiotólum, ið verða drivin við sólorku, so tær kunnu lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingum. (Matteus 7, 7-8)
30. Konur og børn hjá hermonnum í Gabon uppliva stundum mótgang og sakn. Góði Faðir, lat toymi okkara fáa atgongd til at tæna hesum dýrabaru sálum. (Sálmur 9, 10-11 – ensk: 9-10)
31. Harri, vit biðja, at Heilagi Andin vil eggja kvinnunum á Fílabeinsstrondini at hava eitt bønalív og inniligt samband við Teg. (Matteus 6,6)

**”Latið okkum tí við dirvi stíga fram fyri hásæti náðinnar,**

**so vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálp á rættari tíð!”**

***Hebrearabrævið* 4:16**

# At grípa vónina

**Susie Pek, altjóða leiðari fyri Kvinnur við Vón *skrivar:***

## *At hátíðarhalda størstu gávu, ið givin er*

Eg kann nærum ikki trúgva, at eitt annað ár er um at fara aftur um bak! Hvussu verður jólahøgtíðin hildin í tykkara landi? Í Brasil eru gøturnar, sølumiðstøðirnar og handlarnir vakurt prýdd og minna okkum á, at jólini eru í hondum. Nógv spennandi er at gleða seg til ta komandi høgtíðina. Nakað, ið nógv verður hugsað um, er at finna júst røttu gávuna til okkara kæru, og tað er ikki altíð líka lætt. Er tann uppgávan loyst til fulnar, kann gleðin ikki metast, tá ið ein sær eydnusama eygnabrái á teimum, sum hava fingið ta ”fullkomnu” gávuna.

Nú tosað verður um tað, hvat halda tit er ein fullkomin gáva? Eg eri greið yvir, at svarið veldst um, hvar í lívinum vit eru. Tað, ið vit ynsktu okkum sum barn, er heilt øðrvísi enn tað**,** ið vit ynskja okkum sum vaksin. Sum vit vaksa til, kunnu vit framvegis hava ein lista av lutum, ið okkum hevði dámt at havt; Vit fara tó at skilja, at nakrar av teimum dýrabarastu gávunum eru ikki til sølu í nøkrum handli. Góð heilsa, náttúra, vinir ella ein kær familja eru nøkur fá dømi.

Í summum londum leggja fólk jólagávurnar undir jólatræið. Men hevði tað ikki verið nakað serligt at sett eina krukku við einum lista í undir træið, har allar hesar dýrabaru gávurnar, ið ikki kunnu keypast, stóðu á, og síðani lisið tær upp hart jólaaftan? Eg hugsi, at tað hevði ført til enn meiri gleði í hátíðarhaldinum**.**

Hjarta mítt verður altíð fylt við takksemi og vón, tá ið eg taki tíð at skriva niður hesar gávur, bæði í mínum persónliga lívi og í trúartænastuni. Harrin hevur givið okkara *Kvinnur við Vón* toymum kring allan heim tann framíhjárætt at luttaka saman við Honum í hesum verki við at bera kvinnum vón gjøgnum trúartænastu okkara. Tey í toymi okkara á Fílabeinsstrondini søgdu okkum frá einari av hesum dýrabaru gávum: ”Ein kvinna, sum vitjaði bygd okkara, var sera illviljað mótvegis evangeliinum; hon skumpaði øll frá sær, sum nærkaðust henni at siga henni hesi gleðiboð. Men hon hevur júst nú givið lív sítt til Kristus, eftir at hon hevði lurtað eftir *Kvinnur við Vón* sendingunum.”

Kvinnan minnir meg á Matteus 16,13, har Jesus spyr lærisveinar Sínar: ”Hvønn sigur fólk Menniskjasonin vera?” Hann fekk ymisk svar. Tað tykist mær, at henda kvinna fekk greið svar um, hvør Jesus var. Kanska hevur hon fyrr sæð Hann gjøgnum brillurnar hjá teimum, ið síggja Jesus sum ein fjaran og ræðandi Gud. Men tá ið hon bjóðaði Honum inn í lív sítt, fór hon at síggja Hann í einum heilt øðrum ljósi.

Í dag sigur hon sum Pætur í vakrastu fráboðan, ið hann nakrantíð bar fram: ”Símun Pætur svaraði Honum: ”Harri! Hvønn skulu vit fara til! Tú hevur orð hins æviga lívs, og vit hava trúð og fingið at síggja, at Tú er hin Heilagi Guds.”(Jóhannes 6,68-69). Einki kann metast við ta gleði at kenna Jesus sum okkara Frelsara og Gud. Hann er ósigiliga gávan til okkara. Í Honum hava vit sanna vón nú og í allar ævir.

Eg ynski tær og tínum kæru eini gleðilig og innihaldsrík jól. Eg biði, at gleðin, ið henda høgtíð gevur, skal vara alt komandi ár, sum tú heldur teg nær hjá Honum.

Í undurfulla kærleika Hansara

Susie Pek

**”Høvuðsstuðulin undir øllum kristiligum arbeiði er bøn”** **(Eeva Vähäsarja)**

***KVINNUR VIÐ VÓN***

**twrwomenofhope.org**

**Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva**

**Fíggjarstuðul:**

**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145**

**til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio). –**

**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR. –**

**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia –– twre@twr.org**

## GLEÐILIG JÓL

## OG HARRANS SIGNING Í KOMANDI ÁRI